3. - 5. mai í Ítróttarhøllini í Runavík

# Bústevnan

## Hús & Innbúgv







*Staðið har:*

Bygging - Umbygging
Havaarbeiði - Umvæling
Køkar - Vindeygu
Hurðar - Fígging
Trygging - VHS
Hvítvørur - Møblar...

...og øll sum hava við hús & innbúgv at gera, hava møguleika at stilla út.

Lat ikki henda møguleikan gleppa tær av hondum. Ver við á bústevnuni Hús & Innbúgv.

Setið tykkum í samband við okkum!

HÚS & INNBÚGV
Postbox 169 • FO-620 Runavík
Tel 44 91 91 /45 63 98 Fax 44 86 35
Fartel 22 29 82 / 26 15 44
Email nhj@post.olivant.fo



# Túsundtals síður av kodu til sølu

*Vit ætla ikki at keypa telduskipaninar fyri nakran høgan prís, og hevur onkur hug at bjóða ovurprís, so fara vit ikki at bjóða ímóti tí, sigur Óli Olsen, fyrrverandi stjóri á Faroesoft og núverandi stjóri á Kervi*




**Telduskipanirnar hjá P/F Faroesoft undir konkurs eru nú til sølu fyri hægstbjóðandi. Men telduskipanir eru ikki annað enn nógvar túsund reglur av forritanarkodu, og tær eru lítið verdar uttan vitanina hjá teimum fólkunum, ið hava forrita tær. Hesi søgdu øll upp á Faroesoft og stovnaðu KT-fyritøkuna Kervi, ið nú bjóðar uppá skipanirnar**

KONKURS
*Rúnar Reistrup*

Tá ein fyritøka fer konkurs, verða allar ognirnar hjá fyritøkuni seldar við tí fyri eyga at gjalda teimum, ið hava krav í fyritøkuni. Soleiðis er eisini nú trotabúgvið eftir P/F Faroesoft verður gjørt upp.

Men í KT-vinnuni er vitan bæði høvuðstilfeingið og mest umráðandi søluvøran. Hendan vitan situr sum kunnugt í høvdinum á fólki, og tá tey av góðum grundum ikki eru partur av einum trotabúgvi, er ikki nógv virðir eftir í avtiknu KT-fyritøkuni.

Nú verða "vørurnar", sum P/F Faoresoft framleiddi og seldi, lýstar til sølu, men talan er um telduskipanir, ið ikki eru nógv verdar hja øðrum enn teimum, ið hava gjørt tær. Hetta kemst av, at ein telduskipan í botn og grund ikki er annað enn regla eftir reglu, skrivað á forritanarmáli. Og hevur tú ikki sjálvur uppbygt telduskipanina, er tað ógvuliga torført at seta seg inn í hana.

### Hálvskrivað bók

- At keypa telduskipanir, sum onnur hava gjørt, er næstan sum at keypa eina hálvskrivaða skaldsøgu við tí fyri eyga at skriva hana lidna. Tað er illa vert stríðið tí ofta er tað lættari at skriva eina heilt nýggja frá grundini, sigur Óli Olsen, fyrrverandi stjóri á Faroesoft, og núverandi stjóri á nyggju KT-fyritøkuni Kervi. Hann metir, at tað hevði tikið einum góðum forritara upp til eitt ár at sett seg væl inn í telduskipanirnar.

Fyritøkan Kervi varð stovnað av somu fólkum, sum áður myndaðu fyritøkuna Faroesoft. Hesi fólk søgdu seg kollektivt úr starvi, stutt eftir at ein av landsins størstu KT-fyritøkum Farodane hevði keypt fyritøkuna VIT, sum harvið broytti navn til Faroesoft.

### Farodane misti nógv

At meginparturin av starvsfólkunum á Faroesoft søgdu seg úr starvi var beinleiðis orsøkin til, at Faroesoft varð kravd á húsagang av Farodane, sum stutt frammanundan hevði keypt 80 prosent av partapeninginum í fyritøkuni fyri eina upphædd, sum eingin av pørtunum vil upplýsa. Við rýmandi starvsfólkunum fór eisini vitanin - høvuðstilfeingið hjá Faroesoft – og harvið gjørdust vørurnar, telduskipanirnar, eisini so at siga ónytiligar.

Á Farodane viðganga tey uttan at blunka, at fyritøkan hevur mist nógvan pening orsakað av hópuppsøgnini hjá starvsfólkunum, sum við eitt gjørdi fyritøkuna Faroesoft konkursbúna.

- VIT varð fyrst og fremst keypt, tí mett varð, at starvsfólkini vóru dugnalig. Sjálv fyritøkan var niðurpynd og stóð til at fara á heysin og var tískil lítið áhugaverd. Tá starvsfólkini so øll ryma upp á handan mátan er eingin grund til at koyra fyritøkuna víðari, og tí valdu vit at senda hana konkurs, sigur Jan Ziskasen. KT-stjóri á Farodane.

### Ikki sáttmálabundin

Tað kann tykjast eitt sindur løgið, at keyparin, Farodane, ikki tryggjaði seg ímóti at fólk kundu fara úr fyritøkuni uttan nakað hóvasták, tá tað, sum keypt varð, í grundini var starvsfólkið.

Í KT-vinnuni og øðrum vitanarvinnum uttanlands er heilt vanligt at fyritøkur sáttmálabinda fólk so ella so. Hetta valdi Farodane ikki at gera, og starvsfólkini á Faroesoft høvdu tí einki til hindurs fyri at siga upp kollektivt og byrja eina nyggja fyritøku, ið tekst við nøkunlunda tað sama, sum Faroesoft tókst við. Millum annað røkir Kervi í løtuni nógvar av skipanunum, sum fyritøkan VIT forritaði og seldi.

### Lítil áhugi fyri telduskipanunum

Fyri Faroedane er talan um eina søgu, sum fyritøkan helst vil lata fara afturum og gloyma. Tí hevur fyritøkan ikki stórvegis áhuga í at ogna sær telduskipanirnar hjá Faroesoft, sum nú verða seldar av trotabúnum.

Vit hava lítlan og ongan áhuga í hasum telduskipanunum, og vit vilja rætt og slætt helst, at hetta málið fær ein enda nú. Tað hevur verið okkara politikkur í hesum máli, at kundarnir ikki skulu líða, og tí brúka vit ikki meira orku uppá at stríðast við hetta, enn at vit kunnu geva kundunum somu tænastu sum altíð, sigur KT-stjórin á Farodane.

### Kervi fer at bjóða

Tað er trotabúgvið eftir P/F Faroesoft, sum nú selur telduskipanirnar hjá avtiknu fyritøkuni. Tí ber ikki til hjá Farodane at forða fyri, at Kervi, sum í veruleikanum er einasta fyritøka í landinum, sum kann fáa gagn av tí, í at keypa telduskipanirnar.

Spekulatiónir hava verið frammi um møguleikan fyri at Faroedane fer at keypa telduskipanirnar við tí fyri eyga, at fyrrverandi starvsfólkini á Faroesoft, sum nú reka Kervi, ikki skulu fáa hendur á teimum. Men til hetta sigur Jan Ziskasen, at tað hava teir ongar ætlanir um.

Stjórin á Kervi, Óli Olsen, sigur, at fyritøkan sjálvsagt er áhugað í at keypa skipanirnar hjá Faroesoft, nú tær verða settar til sølu.

- Vit fara sjálvandi at leggja boð inn, men tað hevur nú ikki so nógv at siga fyri okkum at vit fáa hendur á telduskipanunum. Skipanirnar eru eftir hondini gamlar, og vit kunnu eins væl gera nakrar nyggjari og betri heldur enn at keypa tær verandi skipanirnar dyrt. So vit ætla ikki at keypa tær fyri nakran høgan prís, og hevur onkur hug at bjóða ovurprís, so fara vit ikki at bjóða ímóti tí, sigur Óli Olsen og sipar soleiðis lítið fjalt til ein varhuga av, at Farodane kann hugsast at hava áhuga í hesum.

### Farodane fær einki burtrúr

Hóast hann ikki ivast í dygdini á teimum telduskipanunum, sum hann sjálvur var við til at seta í verðina sum stjóri fyri VIT, so væntar Óli Olsen ikki, at áhugin fyri at keypa verður serliga stórur.

- Tað krevur so nógv at seta seg inn í hasar skipanirnar, at tað er ivasamt um onnur enn Kervi kunnu fáa stórvegis gagn av teimum. Hatta er jú ikki annað enn síða oman á síðu av forritanarkodu, sum ikki er løtt at skilja hjá øðrum enn teimum, sum hava skrivað hana. Og tað er dýrt at gjalda einum forritara fyri at seta seg inn í koduna, sigur Óli Olsen, stjóri á Faroesoft.

Tá trotabúgvið eftir P/F Faroesoft verður gjørt upp, eftir at aktivini í avtiknu fyritøkuni eru seld, verður farið undir at gjalda teimum, ið hava krav í fyritøkuni. Ovast á prioritetslistanum eru lønarkrøvini hjá starvsfólkunum á fyritøkuni, sum nú nærum øll eiga í og arbeiða fyri Kervi.

- Starvsfólkini fáa sína manglandi løn, og so er helst ikki nógv eftir av virðunum í fyritøkuni. Vit vænta ikki at fáa nakað aftur hendanvegin, sigur Jan Ziskasen, KT-stjóri á Farodane.